## Lyngby tapti ímóti Køge

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin Henrik Larsen var omaná, tá ið hansara lið, ið spælir í næstbestu donsku deildini, royndi seg í venjingardysti ímóti Lyngby, sum fyrireikar seg til superliguna. Eitt mál kom í dystinum, og tað skoraði liðið hjá Stóra, Køge. Á liðnum hjá Lyngby eru tveir føroyskir landsliðsspælarar – Christian Lamhauge Holst og Tem Hansen.



## KÍ og Brøndby hava fótbóltsskúla

Seinnu árini hevur KÍ skipað fyri fótbóltsskúla, har útlendskir venjarar hava verið høvuðsvenjarar. Soleiðis verður aftur í ár. KÍ hevur sín fótbóltsskúla í Klaksvík í døgunum 14. og 15 august. Hesaferð samstarvar KÍ við danska felagið Brøndby um fótbóltsskúlan, og høvuðsvenjari á skúlanum verður John Ranum, sum erin royndur ungdómsvenjari í Brøndby. Hann hevur vant nógvar av stjørnunum, sum eru komnar úr Brøndby – millum annað Daniel Agger, Thomas Kahlenberg og aðrar. Meira ber til at frætta um KÍ fótbóltsskúlan á heimasíðuni hjá KÍ – www.ki.fo

# tið til Jarnbard




*Róðurskvinnan á Jarnbardi, Jannie Dam Jacobsen, kann vinna sín FM-róður nummar 50 á ólavsøku*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

at taka lut hjá 6-mannaførunum í ár, tí uttan tær, so hevði slett eingin kapping verið, siga tær trígggjar kvinnurnar umborð á Jarnbardi at enda.

### 49 sigrar – nummar 50 kann koma á ólavsøku

Sum flest øllum kunnugt, so hevur Jarnbardur verið ótrúliga drúgvar hjá kvinnunum síðstu nógvu árini. Fyrsta meistaraheitið bleiv vunnið í 1991, og síðani er eitt meistaraheiti komið fyri og annað eftir.

Síðstu 17 árini hevur Jarnbardur vunnið 10 føroyameistaraheiti, fýra ferðir er báturin endaðu á øðrum plássi í FM-kappingini, og tvær ferðir er hann endaðu á triðja plássi. Síðani 1991 er tað bert eitt av árunum, at Jarnbardur ikki er endaður millum trý tey ovastu í FM-kappingini. Hetta var í 1994.

Ein av mest kendu kvinnunum innan føroyska kapprógving man vera Jannie Dam Jacobsen, sum hevur stýrt á Jarnbardi síðani 1996. Hetta er sostatt 12. árið, at hon stýrir á Jarnbardi.

Ein av hinum kvinnunum umborð á Jarnbardi hevur tó verið við líka leingi sum Jannie. Her er talan um Eivy Olsen, sum byrjaði umborð á Jarnbardi sama ár sum Jannie. Hon hevur eisini verið við øll árini við undantaki av 1998.

Hesar báðar kvinnurnar munnu eisini vera mest vinnandi kvinnurnar yvirhøvur í føroyskari kapprógving. Eivy Olsen hevur tilsamans vunnið ikki færri enn sjey meistaraheiti, og tað sama hevur Jannie Dam Jacobsen.

Sjálvt um tær báðar hava róð við Jarnbardi síðani 1996, so hava tær ikki vunnið líka nógvar stevnusigrar. Eivy hevur tilsamans vunnið 47 stevnusigrar runt um í landinum, meðan Jannie eisini vann tveir sigrar í 1998, tá Eivy ikki var við. Hetta gevur henni tilsamans 49 sigrar á FM-stevnum kring landið. Tí liggur ein spennandi róður fyri framman á ólavsøku. Tá kann Jannie nevniliga tryggja sær sigur nummar 50 í longu røðini, og so er spurningurin, hvussu leingi hon ætlar at halda fram eftir hetta.

# FM var eitt bonus

**- Vit hugsaðu fyrst og fremst um at vinna vestanstevnuna, sigur Annetta Eidesgaard, sum rør við Hvassa. Hon og hennara liðfelagar tryggjaðu sær meistaraheitið á vestanstevnu**


KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*Munurin aftur til Tambar var meira enn ein bátslongd, tá farið varð um málið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hvassi var ein av teimum mongu bátunum, sum hevði møguleika at tryggja sær meistaraheitið á vestanstevnu. Við einum sigri hjá 5-mannaførumvið gentum vóru tær heilt vísar í Fm-heitinum.

Tað var eisini Hvassi, sum førdi at kalla allan róðurin. Tambar royndi í løtum at trýsta Hvassa, men har var einki at gera, og at enda var Hvassi meir enn eina bátslongd framman fyri Tambar, sum endaði á øðrum plássi.

Ein av gentunum umborð á Hvassa, Annetta Eidesgaard, var sera glað fyri sigurin, og hon segði, at tær hugsaðu ikki so nógv um FM undan róðrinum.

- Hetta var ordiliga deiligt. Vit hugsaðu fyrst og fremst um at vinna hesa stevnuna, og so var meistaraheitið eitt stórt bonus afturat vestanstevnusigrinum.

Hvassi hevur vunnið fimm av seks møguligum róðrum í ár, og nú er bert ólavsøkan eftir. Hana ætla genturnar umborð á Hvassa eisini at vinna.

- Ja, ólavsøkan má eisini vinnast. Tað vildi verið prikkurin yvir i'ið. Henda stevnan er sjálvandi ómetaliga týdningarmikil at vinna, tí tað er keðiligt at vinna meistaraheitið, og so ikki vinna ólavsøkuróðurin, so vit fara at gera alt fyri at vinna hann eisini, sigur Annetta Eidesgaard at enda.

# Gullið fór til Hvannasunds

**Sundabáturin vann eisini vestanstevnuróðurin hjá 6-mannaførum við monnum, og tí megnaði teir at tryggja sær meistaraheitið longu undan ólavsøkuni**


KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*Tað glappa á sundalagsstevnuni, men allar hinar FM-róðrarnar hevur Sundabáturin vunnið, og tí eru teir longu nú meistarar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sundabáturin hevur fingið sera góð úrslit, síðani báturin bleiv bygdur, og í so máta gjørdist árið í ár ikki nakað undantak. Leygardagin megnaðu menninir norðan úr Hvannasundi og Norðdepli nevniliga at tryggja sær enn eitt meistaraheiti, tá teir vunnu næstsíðsta róður á árinum á vestanstevnu í Sørvági.

Tað vóru annars Tvørabáturin og Strálan, sum fingu bestu byrjanina upp á róðurin, og inn eftir firðinum vóru tað teir báðir, sum leingi stríddust um fremstu sessin. So við og við megnaði teir á Tvørabátinum tó at fara frá Stráluni, men í staðin fyri kapping frá strandamonnum, so vóru tað í staðin teir á Sundabátinum, sum byrjaðu at nærkast.

Spakuliga otaði Sundabáturin seg nærri og nærri at Tvørabátinum, og at enda var eingin munur á teimum báðum bátunum.

Sum øllum kunnugt, so hevur Sundabáturin ein øgiligan endaspurt, og aftur á vestanstevnuni kom hesin til sjóndar. Tá ið bátarnir fóru undir endaspurtin hevði Sundabáturin vunnið seg nakað fram um Tvørabátin, men í endanum var eingin ivi. Sundabáturin bara økti um munin, og við sigrinum megnaðu teir eisini at tryggja sær meistaraheitið.